# Stórfingin bústevna í Runavík

**Í døgunum 4. - 6. apríl verður Ítróttarhøllin í Runavík karmur um stórfingnu bústevnuna, Hús & Innbúgv 2003. Eitt stórt tjald verður eisini sett upp við høllina, soleiðis at samlaða framsýningarøkið verður væl meira enn 1000 fermetrar tilsamans**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*



*– Vit ivast ongu løtu í, at stevnan verður fullteknað, og at bæði framsýnarar og vitjandi fáa nakað gott burturúr, sigur Hans Petur Ellingsgaard, ið er ein fyrireikarunum av bústevnuni, Hús & Innbúgv 2003, sum verður í Runavík í døgunum, 4.-6. apríl. Fyri at tryggja sær, at framsýningin gerst bæði breið og fjøltáttað, verður eitt tjald leigað úr útlandinum, soleiðis at samlaða framsýningarøkið verður væl størri enn 1000 fermetrar*

**Runavík:** Fyrstu vikuna av apríl verður heimið ella sethúsini, tú ætlar tær at byggja, hevur bygt ella leigar - saman við øllum tí, sum hartil hoyrir - sett í fokus á stórfingnu bústevnuni, Hús & Innbúgv 2003, sum verður hildin í Runavík í døgunum, 4.- 6. apríl.

Talan er um somu sølustevnu ella messu, sum varð útsett tvær ferðir í fjør. Fyrru ferðina órógvaði valdið, sum var 30. apríl, og aðru ferð var tíðarskeiðið heldur ikki so heppið, tí hetta var háárstíð hjá flestu framsýnarum.

## Fyrr um árið

– Hóast undirtøkan fyri tiltakinum alla tíðina var sera stór, hevði tíðin, orkan og ynskir frá teimum, ið kundu hugsað sær at luttikið, tað við sær, at vit avgjørdu at útseta messuna til nú í vár, sigur Hans Petur Ellingsgaard, sum er ein av stigtakarunum til bústevnuna.

Hann heldur ikki, at ein slík stevna eigur at verða hildin ov tætt uppat summarinum, og tað halda framsýnararnir heldur ikki.

– Hetta er høvuðsorsøkin til, at bústevnan nú verður hildin í døgunum, 4.-6. apríl.

Seinnu árini eru sølustevnurnar, sum javnan verða hildnar her heima á klettunum, í størri og størri mun farnar at bera dám av messum, soleiðis sum vit kenna tær uttanlands.

– Her í Runavík hava vit nú okkara egnu fiskarímessu, okkara KT-messu og nú eisini okkara búmessu, sigur Hans Petur.

## Dreymur og veruleiki

Fyrireikararnir vísa á, at høvuðsendamálið við bústevnuni, Hús & Innbúgv 2003, er at lýsa tey ymisku liðini, sum hugsast kunnu - frá tí, tú droymir um at seta føtur undir egið borð, til heimið endaliga kann gerast veruleiki.

– Øll, sum koma á stevnuna, hava sjálvandi ikki fyri neyðini at fáa lýst øll hesi liðini, talan kann vera um. Nøkur vilja ivaleyst kunna seg um eitthvørt ávíst, ið tey hava áhuga fyri, og hesi skulu sjálvsagt eisini fáa nakað burtur úr á stevnuni, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

Hann vísir á, at onkur kanska stendur og ivast í at skifta sær køk ella vindeygu út, og í slíkum førum kann ein stevna, sum bústevnan, verða eitt kærkomið høvi, har til ber at síggja, hvat rørir seg á marknaðinum.

## Stórur tørvur

– Eitt annað endamál er eisini at fáa savnað sum mest á einum staði av tí vinnu, sum hevur við bústaðin og bygginga at gera, soleiðis at henda vinna kann fáa sítt egna "business-forum", sum Hans Petur tekur til.

Hann heldur, at stórur tørvur hevur verið á eini tílíkari messu í Føroyum.

– Fiski-og alivinnan, oljuvinnan og KT-vinnan hava fingið sítt egna ráðstevnu-og messuforum, og lítið man vera at ivast í, at tørvur eisini er á einum tílíkum forum fyri ta vinnu, ið hevur við bústaðin at gera, sigur Hans Petur.

## Nógvir framsýnarar

Sum dømi um framsýnarar, ið verða við á bústevnuni í Runavík, kunnu nevnast entreprenørar, arkitektar, peningastovnar, tryggingarfyritøkur, byggimeistarar, timburhandlar, sniðhúsaframleiðarar, snikkarvirki, VHS-innleggjarar, el-innstallatørar, málarar, múrarar, telefyritøkur, o.s.fr. Eisini verða handilsfyritøkur innan VHS, el, køkar, baðirúm, hvítvørur, møblar, búnýti og annan útbúnað við á messuni.

Hans Petur sigur, at áhugin fyri messuni er sera stórur og hava nógvar fyritøkur longu boðað frá luttøku, hóast nærum eingin marknaðarføring enn hevur verið í fjølmiðlunum.

Fyri at tryggja sær, at framsýningin gerst breið og fjøltáttað, hava fyrireikararnir av bústevnuni avgjørt eisini at leigað eitt tjald úr útlandinum, sum verður sett upp við Ítróttarhøllini í Runavík. Saman við tjaldinum, verður samlaða framsýningarøkið væl størri enn 1000 fermetrar tilsamans.

## 10% avsláttur

– Vit ivast ongu løtu í, at stevnan verður fullteknað, og at bæði framsýnarar og vitjandi fáa eina stevnu, har tey kunnu fáa nakað gott burturúr, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

Fyrireikararnir vænta, at talið av vitjandi á bústevnuni, Hús & Innbúgv, 4.-6. apríl, verður nøkur túsund úr øllum landinum.

Tilmeldingarfreistin hjá fyritøkum, ið ætla sær at sýna fram, er sett til, 1. mars, men avgjørt er, at tær fyritøkur, ið meldað til fyri 1. februar, fáa 10% í avsláttri.



*Seinnu árini eru sølustevnurnar, sum javnan verða hildnar her heima á klettunum, í størri og størri mun farnar at bera dám av messum, soleiðis sum vit kenna tær uttanlands. – Her í Runavík hava vit nú okkara egnu fiskarímessu, okkara KT-messu og nú eisini okkara búmessu, sigur Hans Petur Ellingsgaard*



# Ráðstevna um sporføri í Fuglafirði

**Ráðstevnan um sporføri innan fiskivinnuna, ið var útsett orsakað av vánaligum floglíkindum, er nú sett á dagskránna aftur. Stevnan verður hildin komandi týsdag, 28. januar**



*Komandi týsdag verður Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um ráðstevnu um sporføri. – Endamálið við stevnuni er at seta sporføri á dagsskránna í føroyska kjakinum, sigur Virkisráðgevingin*

**Fuglafjørður:** Ráðstevnan, sum upprunaliga skuldi haldast, 14. januar, varð útsett, tí tríggir av fyrilestrarhaldarunum ikki náddu fram til tíðina. Arbeitt hevur síðani verið við at finna ein dag, har allir fyrilestrarhaldararnir kundu verða við. Hetta er eydnast, og verður ráðstevnan nú hildin komandi týsdag, 28. januar.

– Av tí, at tað var møguligt at fáa allar teir somu fyrilestrarhaldararnar við til útsettu stevnuna, verður skráin eisini tann sama, upplýsir Virkisráðgevingin.

Ráðstevnan byrjar kl. 10 við innskriving og kaffi. Hon verður sett kl. 10.30.

Høvuðsevnini á ráðstevnuni verða Trace Fish standardirnir fyri veiddan fisk og fyri alifisk. Hesir báðir fyrilestrarnir verða hildnir av Jostein Storøy frá SINTEF og Marco Frederiksen frá DIFRES.

Virkisráðgevingin sigur, at tá ið tosað verður um sporføri, er tann tøkniligi parturin ógvuliga avgerandi. Tí fer Kristján Gislason, umboð fyri Radiomiðun úr Íslandi, at greiða frá um elektroniskar logbøkur og aðrar elektroniskar hentleikar umborð á skipun, við atliti at sporføri.

Fjórði fyrilesturin verður hildin av Poul Johannes Østerø frá Com-data. Hann fer millum annað at lýsa dataflowið í føroysku fiskivinnuni, eitt nú hvør framleiðir data, hvør sendir til hvønn, og nær og hví missa vit sporføri.

Ráðstevnan endar við tí føroysku sporførisvisióni. Her fer Jørleif Bech frá Com-Data at vísa, hvussu ein total sporførisskipan kann síggja út, og hvussu vit kunnu fylgja einari vøru - heilt frá tí, hon er fiskað av havsins grunnum, til keyparin stendur við henni í hondini.

– Ráðstevnan hevur til endamáls at seta evnið sporføri á dagskránna í føroyska kjakinum, soleiðis at vit fáa eina menning á hesum øki.

Virkisráðgevingin sigur, at tey, sum enn ikki hava havt høvi at teknað seg til ráðstevnuna, kunnu ringja á tlf. 449591 og fáa hetta í lag.

Kostnaðurin fyri luttøku er kr. 300,00 fyri hvønn; tá er kaffi allan dagin og sjálvtøkuborð á middegi íroknað.

# Alivinnan á skeið á Fróðskaparsetrinum

**Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum bjóðar nú alivinnuni á skeið um grundleggjandi viðurskifti innan aling**

SKEIÐVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*

*Í mars fara Hørður Wardum, Roar Olsen og Knud Simonsen at greiða alivinnuni frá um aling. Tað er Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum, sum skipar fyri.*



Alivinnan hevur fingið innbjóðing frá Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum um at luttaka í skeiði um aling, sum verður á Náttúruvísindadeildini í vár.

– Skeiðið, sum er partur av lívfrøðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, gevur eina grundleggjandi vitan um aling og tær fyritreytir, ið skulu vera til staðar fyri at fáa sum mest burtur úr hesi vinnu, sigur Eyðfinn Magnussen.

Á skeiðnum verður greitt frá grundleggjandi viðurskiftum um alifisk og umhvørvi, smoltframleiðslu og framleiðslu av vaksnum fiski, kynbótararbeiði og sjúku. At enda verður greitt frá, hvørja ávirkan streymviðurskifti hava á alingina.

## Hørður, Roar og Knud greiða frá

Tað verða Hørður Wardum og Roar Olsen frá P/F Fiskaaling sum fara at taka sær av mesta partinum av undirvísingini, og Knud Simonsen frá Náttúruvísindadeildini fer at taka sær av tí partinum, sum hevur við streymviðurskifti at gera.

Knud arbeiðir m.a við at finna fram til nýggj aliøki í Føroyum.

– Útgangsstøðið hjá honum er eitt streymmodell, sum hann hevur gjørt fyri Føroyar, upplýsir Eyðfinn Magnussen á Náttúruvísindadeildini.

Tey, sum vilja vita meira um skeiðið um aling, kunnu venda sær til Eyðfinn Magnussen á tlf. 352559, tlf. 352550 ella um e-post EydfinnM@Setur.fo